Lesifyritreytir:

- at hava gott talumál
- at spæla spøl við barnið
- at barnið er kunnugt við lesingina
- at barnið kann spæla sær við málið
- at barnið ofta sær bókstavaraðið
- at barnið veit, at lesing kann verða brúkt at fáa størri vitan um umheimin

Og minst til ikki at gera alt eftir einum degi
- men hvønn dag at gera okkurt av tí.
Tað fer óivað at gera mun.

Visti tú:

- at tú ert høvuðspersónurin, tá ið barn títt skal læra at lesa.
- at tað skulu umleið 2000 síður í sjálvlesing til at verða ein góður og tryggur lesari.
- tað sigst, at venjing í 5000 tímar er neyðug til tess at læra eitt nýtt kynstur

Tann fyrsta lesingin

- Kom væl í gongd

Gjørt hava: Tove Jacobsen og Liljan Thomsen, lesivegleiðarar

Um lesing

Tá ið tú lesur fyri barninum:

- Sit nær hjá barninum, so tað eisini sær orðini í bókini, tú lesur.
- Tosa um søgugongdina – og um myndirnar.
- Sig frá orðum, barnið ikki kennir.
- Lat barnið finna bókstavir og orð, tað kennir í tekstinum.

Tá ið barnið lesur fyri tær:

- Les fyrst síðuna; síðan kann barnið royna.
- Um barnið ikki megnar at lesa eitt orð, les tað, so barnið kann koma víðari.
- Tú skalt ikki steðga barninum, um tað lesur ein feil, um hann ikki oyðileggur innihaldið.
- Tað er umráðandi, at tú rósar og stuðlar tínum barni.
- Um barnið heldur, at bókin er ov torfør ella keðilig, so finn eina aðra.

Soleiðis styrkir tú málið hjá barninum:

- Les fyri barninum hvønn dag.
- Syng saman við barninum og spæl við rím og ramsur.
- Tosa um alt virksemið í gerandisdegnum, sum t.d. at telja trapputrin, tosa um, hvat tit gera í køkinum, um lutir, tit ganga framvið, og spyr tað, hvussu dagurin hevur verið.
- Tak upp barnasendingar og hygg saman við barninum, steðga á og tosa um einstakar hendingar og/ella myndir.
- Ikki rætta barnið, um tað framber eitt orð skeivt, men endurtak orðið týðiliga í nýggjum setningi.
- Spæl við bókstavum í orðum sum t.d. mynd og orð.
- Sig frá smáum søgum, og lat barnið eisini sleppa at finna uppá og siga sína søgu ella sítt ævintýr.

Hvat lærir eitt barn, sum spæliskrivar?

- At skrivað verður frá vinstru til høgru.
- At byrjað verður at lesa og skriva í ovasta vinstra horni.
- At skrift umboðar talu.
- At skrift kemur av bókstavum, sum svara til ljóðmyndir í taluni.
- At skrift kann vera eitt øðrvísi samskiftistól.
- At kanna bókstavaljóð.